Kunngerðablaðið A

2009 Hefti 35

ISSN 0907-905X

Nr. 163 21. desember 2009

**Kunngerð**
**um**
**yvirvøku og tálming av lúsum á alifiski**

Við heimild í § 9 og § 48, stk. 2 í løgtingslóg nr. 16 frá 23. februar 2001 um djórasjúkur verður ásett:

**§ 1.** Kunngerðin ásetur reglur um yvirvøku og tálming av lúsum á alifiski.

**§ 2.** Í hesi kunngerð merkir:

1) Alifiskur: Laksafiskur (Salmonidae) og havfiskasløg, sum verða ald á alistøðum á landi og alistøðum á sjónum.
2) Lús á alifiski: Lús av sløgunum laksalús (*Lepeophterius salmonis*), seiðalús (*Caligus elongatus*) og toskalús (*Caligus curtus*).
3) Vaksin kvennlús: Kynsbúgvin kvennlús við ella uttan eggjasekkir.
4) Lús á menningarstigi, sum rørir seg: Vaksin ella hálvvaksin (præadult) lús.
5) Varrafiskar. Ymisk fiskasløg av varrafiskaætt (Labridae), sum kunnu nýtast til at halda talinum á lúsum niðri í einum alibrúki.
6) Viðgerð: Avlúsing við heilivági, annaðhvørt við baði ella fóðri, ella aðrir hættir at beina burtur lýs, undir hesum eisini mekanisk burturbeining.
7) Alifjørður: Ein fjørður, ein vík, eitt sund ella eitt annað allýst avmarkað øki, har ein ella fleiri alistøðir á sjónum ella á landi hava loyvi at ala matfisk.
8) Alibrúk: Lívfiskastøð, smoltstøð, alistøð ella onnur støð, har fiskur verður aldur.
9) Alistøð: Alistøð á landi ella sjónum, har matfiskur verður aldur.
10) Alistøð á landi: Alistøð, har aling av matfiski fer fram í innpumpaðum sjógvi í kari, tanga el.tíl. á landi.
11) Alistøð á sjónum: Alistøð, har aling av matfiski fer fram á flótandi alianleggi á sjónum á einum ella fleiri aliøkjum við tilhoyrandi landstøð.
12) Fiskaeind: Fiskur í einum aliringi, alibúri, tanga, kari el.tíl.

**§ 3.** Teljing og skráseting av laksalúsum og seiðalúsum á laksi og ælabogasílum skal verða gjørd eftir skrivligari vegleiðing frá Heilsufrøðiligu starvsstovuni í minsta lagi 14. hvønn dag í tíðarskeiðinum frá 1. mai og til 31. desember og í minsta lagi 1 ferð um mánaðin frá 1. januar til 30. apríl.
*Stk. 2.* Teljast og skrásetast skulu
1) tal á kynsbúnum kvennlúsum,
2) tal á lúsum, sum røra seg, og
3) tal á fastsitandi lúsum.
*Stk. 3.* Heilsufrøðiliga starvsstovan kann áleggja teljing, skráseting og fráboðan av øðrum lúsum á alistøðum.
*Stk. 4.* Úrslitini av lúsateljingunum á alifiski skulu verða skrásett í rakstrardagbókini á alibrúkinum og skulu verða fráboðað Heilsufrøðiligu starvsstovuni eftir galdandi reglum um sjúkufyribyrgjandi rakstur av alibrúkum. Skráseting og fráboðan skulu verða framd í seinasta lagi dagin eftir, at teljingin er gjørd.

**§ 4.** Hesi markvirði verða sett fyri laksalýs, roknað sum miðaltalið á lúsum á øllum fiskunum, sum eru tiknir til kanningar í hvørjari alistøð sær:
1) Fleiri enn 2 vaksnar kvennlýs, ella
2) fleiri enn 10 lýs á menningarstigi, sum røra seg.
*Stk. 2.* Verður farið upp um markvirðini í stk. 1 fyri laksalýs á alifiski, skal Heilsufrøðiliga starvsstovan beinanvegin hava fráboðan um hetta.

**§ 5.** Í alibrúkum, har farið er upp um markvirðini í § 4, skal verða viðgjørt fyri lýs í øllum fiskaeindum í viðkomandi alibrúki. Viðgerðin skal byrja sum skjótast, eftir at lúsatrupulleikin er staðfestur, og skal vera liðug í seinasta lagi 14 dagar seinni.
*Stk. 2.* Landsdjóralæknin kann krevja, at viðgjørt verður samstundis fyri lýs á alifiski í øllum fiskaeindum, ið liggja í sama alifjørði sum alibrúkið, har lúsatrupulleikin, sbr. § 4, er staðfestur.

*Stk. 3.* Landsdjóralæknin kann krevja, at viðgjørt verður samstundis fyri lýs í fleiri alifirðum, um tað verður mett neyðugt við samskipan fyri at tálma lýsnum.
*Stk. 4.* Landsdjóralæknin kann krevja samskipaða brakklegging fyri fleiri alifirðir, um tað verður mett neyðugt við samskipan fyri at tálma lýsnum.
*Stk. 5.* Landsdjóralæknin kann geva loyvi til, at viðgerðin verður útsett í teimum førum, har talið á lúsum bert í lítlan mun er farið upp um markvirðini í § 4, um tað kann væntast, at tað ber til á annan hátt at minka um talið á lúsum, t.d. við at flyta alibrúkið har, sum meira rák er ella við at nýta ymsar varrafiskar, har samskipað avlúsing er fyri framman ella um fiskurin verður tikin skjótt eftir hetta.
*Stk. 6.* Viðgerast skal á tann hátt, at fiskurin fær ta terapeutisku nøgdina, sum er lýst í leiðbeiningini um evnið, í allari viðgerðartíðini. Eisini skal tryggjast, at fiskurin ikki fær ov stóran skamt, at fiskurin fær rætta nøgd av súrevni undir viðgerðini og at fiskurin annars ikki fær mein av viðgerðini.
*Stk. 7.* Frá 1. mai 2011 skal øll baðiviðgerð fremjast í afturlatnum eindum.
*Stk. 8.* Til 1. mai 2011 kann baðiviðgerð fremjast við skjúrti. Um skjúrt verður nýtt, skal nótin hálast upp til minst 2 metrar yvir dýpdina á skjúrtinum. Øll skoyti skulu vera tøtt.
*Stk. 9.* Áðrenn viðgjørt verður við fóðri skal tryggjast, at fiskurin tekur fóður til sín.
*Stk. 10.* Heilsufrøðiliga starvsstovan kann geva undantaksloyvi til viðgerð fyri lýs á alifiski, sbr. § 4, til fiskaeindir ella alibrúk, sum eru í ferð við at slátra út, ella har útslátring skal fara fram, áðrenn afturhaldstíðin fyri viðkomandi lúsaheilivág er farin.

**§ 6.** Úrslitið av hvørjari viðgerð skal eftirmetast. Nýggj lúsateljing skal gerast beint eftir at viðgerðin er liðug sbrt. vegleiðing frá framleiðara. Um viðgerðin er ófullfíggjað í mun til markvirðið í § 4, skal orsøkin greiðast.
*Stk. 2.* Ófullfíggjað viðgerð, illgruni um mótstøðuføri og ávísing av mótstøðuføri skulu verða fráboðað Heilsufrøðiligu starvsstovuni beinanvegin.
*Stk. 3.* Um illgruni er um mótstøðuføri ella um mótstøðuføri er ávíst, skal viðgerast av nýggjum við einum øðrum evni.
*Stk. 4.* Um onnur evni heldur ikki geva eina fullfíggjaða viðgerð, ella onnur evni av øðrum orsøkum ikki kunnu nýtast, kann landsdjóralæknin áleggja tiltøk, íroknað slátur ella burturbeining av fiskinum, fyri at forða fyri spjaðing av laksalúsum.

**§ 7.** Øll alibrúk skulu, sum partur av tilbúgvingarætlanini, sum er lýst í *Kunngerð nr. 135 frá 26. oktober 2009 um sjúkufyribyrgjandi rakstur av alibrúkum (Rakstrarkunngerðin),* hava eina ætlan um tálming av lúsum. Skjalprógvast skal, at ein tálming sbrt. § 23 í Rakstrarkunngerðini kann fara fram. Ætlanin skal í minsta lagi innihalda:
1) Mannagongd fyri lúsateljing,
2) mannagongd fyri viðgerð og viðgerðarhættir, undir hesum eisini samskipan av viðgerðum, og
3) mannagongd fyri eftirmeting av viðgerð.

**§ 8.** Avgerðir, tiknar av Heilsufrøðiligu starvsstovuni ella landsdjóralæknanum sambært hesi kunngerð, kunnu kærast til Vinnukærunevndina.

**§ 9.** Um ikki hægri revsing er uppiborin eftir aðrari lóggávu, verður við bót revsaður tann, sum
1) brýtur reglurnar í § 3, § 4, stk. 2, § 5, stk. 1) § 5, stk. 6-9, § 6, stk. 2-3, ella
2) ikki ger eftir boðum eftir § 5, stk. 2, § 6, stk. 4.

**§ 10.** Revsiábyrgd kann verða áløgd løgfrøðiligum persónum sbrt. reglunum í 5. kapitli í revsilógini.

**§ 11.** Heimildin hjá landsstýrismanninum eftir § 50 í djórasjúkulógini at avgera revsimál uttan rættarsókn verður løgd Heilsufrøðiligu starvsstovuni.

**§ 12.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Vinnumálaráðið, 21. desember 2009

**Johan Dahl (sign.)**
landsstýrismaður

/Arne Poulsen (sign.)

# Eykajáttanarløgtingslóg

# fyri

# desember 2009

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

## § 3. Fíggjarmál

### A. Yvirlit

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr. | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | -1.000 | -1.000 | - |
| Løgu ætlan | - | - | - |

| | | |
|---|---|---|
| **Almannamál** | **500** | **-** |
| 3.21.2. Útgjaldsskipanir............................................................ | 500 | - |
| **Íbúðarmál** | **3.000** | **-** |
| 3.22.4. Útgjaldsskipanir............................................................ | 3.000 | - |
| **Sjóvinna** | **-4.500** | **-** |
| 3.35.1. Ymsar útreiðslur.......................................................... | -4.500 | - |

### B. Játtanir

| | | Útr. | Innt. |
|---|---|---|---|
| | | - Tús. kr. - | |
| **3.21.2. Útgjaldsskipanir** | | | |
| 21.2.01. Stuðul til flutning og dupult húsarhald (Lógarbundin j.) | J: | 18.500 | - |
| | **EYJ:** | **500** | **-** |
| **3.22.4. Útgjaldsskipanir** | | | |
| 22.4.04. Stuðul til bygging og umvæling av egnum bústaði | J: | 25.000 | - |
| | **EYJ:** | **3.000** | **-** |
| **3.35.1. Ymsar útreiðslur** | | | |
| 35.1.05. FAS-endurgjald (Lógarbundin j.) | J: | 84.800 | - |
| | **EYJ:** | **-4.500** | **-** |

## § 5. Fiskivinnumál

### A. Yvirlit

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr. | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | - | - | - |
| Løgu ætlan | 12.000 | 12.000 | - |

| | | |
|---|---|---|
| **Sjóvinna** | **12.000** | **-** |
| 5.35.1. Ymsar útreiðslur.......................................................... | 12.000 | - |

**B. Játtanir**

| | | Útr. | Innt. |
|---|---|---|---|
| | | - Tús. kr. - | |
| **5.35.1. Ymsar útreiðslur** | | | |
| 35.1.10. Trygdarmiðstøðin (Løguj.) | J: | - | - |
| | **EYJ:** | **12.000** | **-** |

## § 7. Mentamál

### A. Yvirlit

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr. | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | 1.000 | 1.000 | - |
| Løgu ætlan | - | - | - |

| | Útr. | Innt. |
|---|---|---|
| **Útbúgving og gransking** | **1.000** | **-** |
| 7.23.3. Miðnámsútbúgvingar.................................................. | 1.000 | - |

**B. Játtanir**

| | | Útr. | Innt. |
|---|---|---|---|
| | | - Tús. kr. - | |
| **7.23.3. Miðnámsútbúgvingar** | | | |
| 23.3.14. Studningur til læurpláss (Lógarbundin j.) | J: | 14.010 | - |
| | **EYJ:** | **1.000** | **-** |

## § 12. Almannamál

### A. Yvirlit

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr. | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | - | - | - |
| Løgu ætlan | -12.000 | -12.000 | - |

| | Útr. | Innt. |
|---|---|---|
| **Almannamál** | **-12.000** | **-** |
| 12.21.6. Eldri og brekað ......................................................... | -12.000 | - |

**B. Játtanir**

| | | Útr. | Innt. |
|---|---|---|---|
| | | - Tús. kr. - | |
| **12.21.6. Eldri og brekað** | | | |
| 21.6.16. Eldrasambýli (Løguj.) | J: | 14.800 | - |
| | **EYJ:** | **-12.000** | **-** |

Tórshavn, 22 desember 2009

**Kaj Loe Johannesen (sign.)**
løgmaður

82/2009

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um dagpening vegna sjúku v.m.**

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 74 frá 8. mai 2001 um dagpening vegna sjúku v.m., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 9 frá 30. mars 2004, verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 4, 2. pkt. verður orðað soleiðis:
„Hesin rættur dettur burtur frá tí 1. í mánaðinum eftir, at viðkomandi hevur fingið tillutað fólkapensjón ella er fyltur 70 ár.“

2) § 12, stk. 2, 2. pkt. verður strikað.

3) Í § 25, stk. 1 verður „Kærunevndina í almannamálum“ broytt til: „Kærunevndina í almanna- og heilsumálum“.

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2010.
*Stk. 2.* Fólkapensjónistur, ið er sjúkur og sum fær sjúkradagpening, tá lógin kemur í gildi, verður ikki ávirkaður av broytingini í § 1, nr. 1, fyrr enn játtaða dagpeningatíðarskeiðið er úti.

Tórshavn, 22 desember 2009

**Kaj Leo Johannesen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 24/2009

Nr. 166 22. desember 2009

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um lønarhæddaravgjald**

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 193 frá 10. desember 1993 um lønarhæddaravgjald, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 39 frá 28. apríl 2009, verður í § 4, stk. 2 „5%" broytt til: „10%".

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2010.

Tórshavn, 22 desember 2009

**Kaj Leo Johannesen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 25/2009

Nr. 167 22. desember 2009

## Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommuskatt

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

### § 1

Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 80 frá 25. mai 2009, verða gjørdar hesar broytingar:

Í § 54, stk. 2 og í § 64 verður „50%“ broytt til: „52%“.

### § 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2010 og fer úr gildi 1. januar 2012.

Tórshavn, 22 desember 2009

**Kaj Leo Johannesen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 27/2009

Nr. 168 22. desember 2009

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um stuðul til bygging og umvæling av egnum bústaði**

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 58 frá 7. juni 2007 um stuðul til bygging og umvæling av egnum bústaði, sum broytt við løgtingslóg nr. 80 frá 25. mai 2009, verða gjørdar hesar broytingar:

**1)** § 1, stk. 2 verður orðað soleiðis:
„*Stk. 2.* Stuðul verður veittur fyri meirvirðisgjald av arbeiðsløn við einari upphædd pr. matr. nr.“

**2)** Í § 1 verður aftaná stk. 2 sum nýggj stk. sett:
„*Stk. 3.* Hægsta stuðulsupphæddin er fram til 30. juni 2010 kr. 150.000, hereftir lækkar hægsta stuðulsupphæddin soleiðis, at hon er:
1) kr. 100.000 frá 1. juli 2010 til og við 30. juni 2011,
2) kr. 50.000 frá 1. juli 2011 til og við 31. desember 2011 og
3) kr. 0 frá 1. januar 2012.
*Stk. 4.* Eftirverandi stuðulsupphæddin er lægra talið av hesum:
1) hægsta stuðulsupphæddin í tíðarskeiðnum ávikavist
2) kr. 150.000 minus stuðul, sum áður er rindaður eftir hesi løgtingslóg.“
Stk. 3 verður hereftir stk. 5.

**3)** § 1a, stk. 2 verður orðað soleiðis:
„*Stk. 2.* Stuðul verður veittur fyri meirvirðisgjald av arbeiðsløn við einari upphædd pr. lutin í felagnum.“

**4)** Í § 1a verður aftaná stk. 2 sum nýggj stk. sett:
„*Stk. 3.* Hægsta stuðulsupphæddin er fram til 30. juni 2010 kr. 150.000, hereftir lækkar hægsta stuðulsupphæddin soleiðis, at hon er:
1) kr. 100.000 frá 1. juli 2010 til og við 30. juni 2011,
2) kr. 50.000 frá 1. juli 2011 til og við 31. desember 2011 og
3) kr. 0 frá 1. januar 2012.
*Stk. 4.* Eftirverandi stuðulsupphæddin er lægra talið av hesum:
1) hægsta stuðulsupphæddin í tíðarskeiðnum ávikavist
2) kr. 150.000 minus stuðul, sum áður er rindaður eftir hesi løgtingslóg.“
*Stk. 3* verður hereftir stk. 5.

**5)** Í § 1a, stk. 3, sum verður stk. 5, verður „§ 1, stk. 3“ broytt til: „§ 1, stk. 5“.

**6)** Í § 2, stk. 3 verður „Toll- og Skattstova Føroya“ broytt til: „TAKS“.

**7)** Í § 4, stk. 1 verður „kommunalu skattakærunevndina“ broytt til: „Skatta- og Avgjaldskærunevndina“.

**8)** Í § 4 verður stk. 2 strikað.
Stk. 3 verður hereftir stk. 2.

**9)** Í § 4, stk. 3, sum verður stk. 2, verður „stk. 1 og 2“ broytt til: „stk. 1“.

**10)** Í § 6 verður stk. 1 orðað soleiðis:
„Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og hon fer úr gildi 1. januar 2012.“

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Tórshavn, 22 desember 2009

**Kaj Leo Johannesen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 30/2009

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti**

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

§ 1

Í løgtingslóg nr. 87 frá 1. september 1983 um áseting av skatti, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 80 frá 25. mai 2009, verða gjørdar hesar broytingar:

**1)** Í § 1, stk. 1 verður skattaskalin orðaður soleiðis:
„Galdandi frá 1. januar 2010:
Er inntøkan minni enn kr. 30.000,- verður latið 0%.

| **Er inntøkan størri enn** | **men minni enn** | **verður latið** | **av** | **og av restini** |
|---|---|---|---|---|
| kr. | kr. | kr. | kr. | |
| 30.000 | 70.000 | 0 | 30.000 | 7,0% |
| 70.000 | 140.000 | 2.800 | 70.000 | 18,0% |
| 140.000 | 250.000 | 15.400 | 140.000 | 21,0% |
| 250.000 | 400.000 | 38.500 | 250.000 | 33,0% |
| 400.000 | | 88.000 | 400.000 | 35,0% |

Galdandi frá 1. januar 2012:
Er inntøkan minni enn kr. 30.000,- verður latið 0%.

| **Er inntøkan størri enn** | **men minni enn** | **verður latið** | **av** | **og av restini** |
|---|---|---|---|---|
| kr. | kr. | kr. | kr. | |
| 30.000 | 70.000 | 0 | 30.000 | 7,0% |
| 70.000 | 140.000 | 2.800 | 70.000 | 18,0% |
| 140.000 | 250.000 | 15.400 | 140.000 | 21,0% |
| 250.000 | | 38.500 | 250.000 | 33,0%“ |

2) Í §5, stk. 1 verður „38%“ ávikavist „62%“ broytt til: „30%“ ávikavist „70%“.

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. § 1, nr. 1 og 2 hava virknað frá 1. januar 2010, meðan § 1, nr. 3 hevur virknað frá 1. januar 2009.

Tórshavn, 22 desember

**Kaj Leo Johannesen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 31/2009

Nr. 170

22. desember 2009

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti (Ásetingarlógin)**

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 87 frá 1. september 1983 um áseting av skatti, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 80 frá 25. mai 2009, verður í § 8a, stk. 1 aftaná 2. pkt. sum nýtt 3. pkt. sett:

„Eiga persónar í felag hús v.m., ið verða útleigað til bústaðarendamál, er samlaði frádrátturin 24.000 kr.“.

Pkt. 3 og 4 verða hereftir pkt. 4 og 5.

**§ 2.**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og hevur virknað frá 1. januar 2010.

Tórshavn, 22 desember 2009

**Kaj Leo Johannesen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 81/2009

## Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um stuðul til rentuútreiðslur

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

### § 1

Í løgtingslóg nr. 148 frá 30. desember 1996 um stuðul til rentuútreiðslur av lánum, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 80 frá 25. mai 2009, verða gjørdar hesar broytingar:

**1)** Í § 2 verða sum nýggj stykki sett:
„*Stk. 3.* Stuðul fyri tey lán, sum eru nevnd í stk. 1, nr. 2, litra a og b, verður bert veittur fyri matrikulnummarið ávikavist bústaðaeindina, har viðkomandi verður hildin at búgva, t.e. tann bústaður, sum viðkomandi persónliga og fíggjarliga er mest knýttur at (miðdepilin í lívsáhugamálunum).
*Stk. 4.* Rentustuðul verður ikki veittur fyri provisjónir og líknandi gjøld.“

**2)** Í § 3 verður stk. 2 orðað soleiðis:
„*Stk. 2.* Fyri tey lán, sum eru nevnd í § 2, stk. 1, nr. 2, litra a, verður rentustuðul í mesta lagi veittur við tí í § 5 nevndu prosentupphædd av kr. 150.000 fyri hvørt ár.“

**3)** Í § 3 verður stk. 3 strikað.
Stk. 4 verður hereftir stk. 3.

**4)** § 5 verður orðað soleiðis:
“**§ 5.** Tann árliga prosentupphæddin er 40% í 2009, hereftir lækkar rentustuðulin soleiðis:

1) Í 2010 er rentustuðulin 39%.
2) Í 2011 er rentustuðulin 38%.
3) Í 2012 er rentustuðulin 37%.
4) Í 2013 er rentustuðulin 36%.
5) Í 2014 og seinni er rentustuðulin 35%.”

**5)** Í § 6 verður stk. 3 orðað soleiðis:
“*Stk. 3.* Rentustuðulin, nevndur í § 5, verður býttur millum land og kommunu, sum niðanfyri tilskilað:

| Ár | Landið | Kommunan |
|---|---|---|
| 2009 | 27% | 13% |
| 2010 | 26% | 13% |
| 2011 | 25% | 13% |
| 2012 | 25% | 12% |
| 2013 | 24% | 12% |
| 2014 og seinni | 23% | 12% |

### § 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, men hevur virknað frá framløgudegnum.

Tórshavn, 22. desember 2009

**Kaj Leo Johannesen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 29/2009

Nr. 172 22. desember 2009

**Løgtingslóg um broyting í lóg um almenna forsorg**

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg

**§ 1**

Í lovbekendtgørelse nr. 100 frá 2. marts 1988 om offentlig forsorg, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 66 frá 25. mai 2009, verður § 9, stk. 2, 4. pkt. orðað soleiðis: „Tó kann samlaði stuðulin, ið verður útgoldin persónum í sambandi við vantandi arbeiðsmøguleikar, ikki vera hægri enn 75% av lønini sambært galdandi høvuðssáttmála millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Føroya Arbeiðarafelag.“

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Tórshavn, 22 desember 2009

**Kaj Leo Johannesen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 33/2009

Nr. 173 22. desember 2009

# Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um skatting av kapitalvinningi (Kapitalvinningsskattalógin)

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 164 frá 21. desember 2001 um skatting av kapitalvinningi, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 49 frá 16. mai 2006, verður gjørd henda broyting:

§ 29 verður orðað soleiðis:

„**§ 29.** Í tíðarskeiðinum 2010 – 2013 verður 35%-skatturin, ið er nevndur í §§ 14, stk. 2, 15, stk. 1 og 16, stk. 1 broyttur soleiðis, at hann í 2010 er 39%, í 2011 er skatturin 38%, í 2012 er skatturin 37% og í 2013 er skatturin 36%.“

**§ 2.**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Tórshavn, 22 desember 2009

**Kaj Leo Johannesen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 35/2009

Nr. 174 22. desember 2009

## Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um uppihald á stovni o.l.

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

### § 1

Í løgtingslóg nr. 108 frá 22. desember 1999 um uppihald á stovni o.l., sum broytt við løgtingslóg nr. 54 frá 9. mai 2005 og løgtingslóg nr. 35 frá 9. mai 2006, verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 5, stk. 1 verður „10%“ broytt til: „30%“.

2) Í § 5, stk. 6 verður „ásetur“ broytt til: „roknar“.

3) Í § 11, stk. 1 verður “Kærunevndina í Almannamálum broytt til: „Kærunevndina í almanna- og heilsumálum“.

### § 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2010.

Tórshavn, 22 desember 2009

**Kaj Leo Johannesen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 40/2009

Nr. 175 22. desember 2009

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um vektgjald av motorakførum v.m.**

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 38 frá 31. mars 1982 um vektgjald av motorakførum v.m., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 157 frá 22. desember 2005, verður í § 11 aftaná nr. 4 sum nýtt nummar sett:
„5) Líkvognar og prutl."

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Tórshavn, 22 desember 2009

**Kaj Leo Johannesen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 63/2009

Nr. 176 22. desember 2009

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um dagpening vegna sjúku v.m.**

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 74 frá 8. mai 2001 um dagpening vegna sjúku v.m., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 9 frá 30. mars 2004, verður í § 12 sum stk. 3 sett:

„Hóast ásetingina í stk. 2, kann dagpeningur verða veittur í upp til 2 ár í málum um arbeiðsskaða, sum eru fráboðað Vanlukkutryggingarráðnum, og sum verða viðgjørd eftir løgtingslógini um trygging móti avleiðingunum av arbeiðsskaða (Arbeiðsskaðatrygg-ingarlógin).“

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2010.

Tórshavn, 22 desember 2009

**Kaj Leo Johannesen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 64/2009

Nr. 177 22. desember 2009

**Løgtingslóg**
**um**
**umsiting av ogn hjá ómyndugum og persónum undir verju o.a**

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

**§ 1.** Lógin fevnir um ogn hjá persónum, sum eru aldursómyndug sambært § 1 í verjumálslógini ella undir verju sambært §§ 5 og 6 í verjumálslógini, Anordning om ikrafttræden for Færøerne af værgemålsloven.
*Stk. 2.* Reglurnar í hesi lóg eru ikki galdandi fyri samverjumál sbr. § 7 í verjumálslógini.
*Stk. 3.* Reglurnar í hesi lóg eru ikki galdandi fyri verjumál, har verjin saman við einum hjúnafelaga umsitur tann partin av felagsbúnum, sum er fevndur av verjumáli, sbr. § 33, stk. 1 í verjumálslógini.

*Umsiting*

**§ 2.** Reiður peningur, partabrøv, lánsbrøv, veðskuldarbrøv og onnur virðisbrøv, sum koma undir eitt verjumál, skulu umsitast av eini umsitingardeild í peningastovni, sum Innlendismálaráðið hevur góðkent til endamálið.
*Stk. 2.* Verjin umsitur
1) fastar ognir, leysafæ, krav um býtishandil ella vøruveiting og onnur virðir, sum ikki verða umsitin av umsitingardeild eftir stk. 1, og
2) upphæddir undir eina stødd, sum verður ásett av Innlendismálaráðnum.

*Stk. 3.* Verjin skal syrgja fyri, at ogn, fevnd av stk. 1, verður latin eini umsitingardeild, og verjin kann ikki vátta fyri móttøku av slíkari ogn.

*Hvar skal ogn setast*

**§ 3.** Reiður peningur, fevndur av einum verjumáli, skal setast inn í eina umsitingardeild, sbr. § 2, stk. 1, ella í ein peningastovn, sbr. § 2, stk. 2, nr. 2, ella setast í virðir, sum hava nøktandi trygd.

*Gávur og fríarvur*

**§ 4.** Viðvíkjandi gávu til aldursómyndug ella persón undir verju verða reglurnar í § 2, stk. 1 og § 3 einans brúktar, um gávugevarin hevur ásett hetta.

**§ 5.** Í testamenti kann arvaleggjarin áseta, at reglurnar í § 2, stk. 1 og § 3 ikki skulu nýtast viðvíkjandi fríarvi.

*Umsitingarligar reglur*

**§ 6.** Innlendismálaráðið ásetir reglur um
1) umsiting sambært § 2 og um eftirlit við umsitingardeildunum, heruppií um teirra skyldur at lata upplýsingar um teirra umsjón,
2) í hvørji virðir, ogn fevnd av verjumáli, kann verða sett í, sbr. § 3 og um undantøku av minni upphæddum frá reglunum um, hvar virði verða sett í,
3) skyldu hjá almennum myndugleikum, tryggingarfeløgum, pensjónskassum og peningastovnum at inngjalda ogn, fevnd av § 2, stk. 1, til eina umsitingardeild, og um skyldu at boða eftirlitsmyndugleikanum frá framhaldandi veitingum til ein aldursómyndugan ella persón undir verju og
4) møguleikan til í ítøkiligum førum at víkja frá reglunum um umsiting og reglunum um, hvar ogn skal setast í.

*Eftirlit og kæra*

**§ 7.** Innlendismálaráðið hevur eftirlit við umsitingardeildunum.
*Stk. 2.* Innlendismálaráðið kann krevja allar upplýsingar frá umsitingardeildunum, sum eru neyðugar fyri eitt fullgott eftirlit.
*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin kann leggja eftirlitsmyndugleikan til ein annan stovn ella myndugleika.

**§ 8.** Avgerðir hjá umsitingardeildunum kunnu kærast til Innlendismálaráðið.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann leggja kærumyndugleikan til ein annan myndugleika ella stovn og áseta, at avgerðirnar hjá hesum skulu vera endaligar.

**§ 9.** Starvsfólk í umsitingardeildunum hava tagnarskyldu um tað, sum tey fáa kunnleika um viðvíkjandi umsiting av peningaogn.

*Gildiskoma v.m.*

**§ 10.** Hendan lógin kemur í gildi 1. mai 2010.
*Stk. 2.* Samstundis fer úr gildi “Anordning nr. 186 af 12. maj 1962 om ændring i anordning angående udlån af umyndiges og andre under offentlig bestyrelse eller offentligt tilsyn stående midler m.m”

**§ 11.** Ogn, sum tá lógin fær gildi, verður umsitin av Føroya Yvirformyndarí, skal innan 31. desember 2012 verða flutt til umsiting í eini umsitingardeild.
*Stk. 2.* Ogn, sum aldursómyndugur ella persónur undir verju fær aftan á 15. februar 2010, og sum skal umsitast eftir § 2, verður tó latin til Føroya Yvirformyndarí at umsita, um tann aldursómyndugi ella persónurin undir verju eigur ogn har, sum enn ikki er flutt til umsiting í eini umsitingardeild.
*Stk. 3.* Nærri reglur um flyting og um framhaldandi umsiting av ogn í skiftistíðini verður ásett av Innlendismálaráðnum, sum um neyðugt kann leingja freistina í stk. 1.

Tórshavn, 22 desember 2009

**Kaj Leo Johannesen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 68/2009

Nr. 178 22. desember 2009

# Løgtingslóg um almenna heilsutrygd

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

## Kapittul 1

*Rætturin til veitingar*

**§ 1.** Persónar, ið eru búsitandi í Føroyum, hava rætt til veitingar sambært hesi lóg.

*Stk. 2.* Persónar, sum flyta til Føroyar úr Danmark og Grønlandi, hava rætt til veitingar sambært hesi lóg frá tí degi, teir flyta til Føroyar. Persónar, ið flyta til Føroyar úr øðrum londum, hava rætt til veitingar sambært lógini 6 vikur aftaná, at teir eru fluttir til Føroyar. Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um, at ávísir persónsbólkar kunnu fáa rætt til lógarinnar veitingar skjótari enn 6 vikur eftir, at teir eru fluttir til Føroyar.

*Stk 3.* Landsstýrismaðurin í heilsumálum kann áseta nærri reglur um, at persónar, sum fyribils uppihalda sær í Føroyum, kunnu fáa rætt til veitingar sambært hesi lóg.

*Heilsutrygdarprógv*

**§ 2.** Persónar, sum eru fevndir av § 1, stk. 1 og 2, fáa útflýggjað eitt heilsutrygdarprógv. Prógvið kann nýtast sum skjalprógv viðvíkjandi rættinum til veitingar sambært lógini.

*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin í heilsumálum kann áseta nærri reglur um útsjónd, nýtslu, innihald, útflýggjan og afturtøku av próvnum.

*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin í heilsumálum kann áseta nærri reglur um gjald fyri nýtt heilsutrygdarprógv, um tann tryggjaði ynskir upplýsingar á próvnum broyttar, um prógvið er mist, ella um prógvið er oyðilagt

## Kapittul 2

*Veitingar*

**§ 3.** Allir persónar, ið lúka treytirnar í lógini, hava rætt til ókeypis viðgerð hjá kommunulækna.

*Stk. 2.* Persónar í aldrinum 15 til 18 ár kunnu sjálvir velja kommunulækna uttan samtykki frá foreldrum ella verja.

*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur um val av kommunulækna.

**§ 4.** Allir persónar, sum lúka treytirnar í lógini, hava, eftir ávísing frá kommunulækna, rætt til ókeypis læknahjálp hjá serlækna, ið er fevndur av sáttmála við Heilsutrygd.

*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin í heilsumálum ásetur nærri reglur um ávísing til læknahjálp eftir stk. 1, herundir at síggjast kann burtur frá kravinum um ávísing.

*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin í heilsumálum ásetur reglur um, at Heilsutrygd rindar útreiðslur til neyðugan tolk í sambandi við læknahjálp.

*Endurgjald til ferðing til og frá lækna og jarðarmóður*

**§ 5.** Endurgjald kann vera veitt fyri flutning til og frá kommunulækna í sambandi við sjúkraviðgerð ella kanning.

*Stk. 2.* Endurgjald fyri flutning til og frá serlækna verður bert veitt, um kommunulæknin hevur ávíst persónin til serlækna, og um henda sjúkraviðgerð ella kanning verður framd í Føroyum.

*Stk. 3.* Heilsutrygd veitir persónum, sum eru fevndir av lógini, endurgjald fyri flutning til og frá jarðarmóður.

*Stk. 4.* Endurgjald verður veitt, um flutningur fer fram við tí eftir umstøðunum bíligasta og fullgóða flutningsfarinum, og um flutningsseðil frá læknanum verður flýggjaður Heilsutrygd.

*Stk. 5.* Landsstýrismaðurin ásetur reglur um endurgjald fyri flutning sambært stk. 1 - 4, og reglur um heintan og flutning av heilivági, blóðroyndir, fylgjarar til eldri fólk, óhjálpin og børn undir 18 ár og evstamark fyri endurgjaldi.

*Eftirbataheim*

**§ 6.** Stuðul verður veittur til uppihald á einum av landsstýrismanninum góðkendum eftirbataheimi í upp til 4 vikur. Stuðulin er treytaður av, at lækni metir uppihald vera neyðugt aftan á viðgerð á sjúkrahúsi ella í serligum førum aftan á læknaviðgerð í heiminum.

*Stk. 2.* Heilsutrygd kann, um lækni metir framhaldandi uppihald vera neyðugt, veita stuðul til uppihald í 2 vikur afturat.

*Gravarhjálp*

**§ 7.** Við deyða verður gravarhjálp veitt. Gravarhjálpin kann í mesta lagi vera 5.000 kr.

*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin í heilsumálum ásetur nærri reglur um útrokning og útgjald av gravarhjálpini.

*Ískoyti til gjald fyri ymiskar viðgerðir*

**§ 8.** Ískoyti verður veitt til gjald fyri viðgerð hjá:

1) tannlækna,
2) kiropraktori,
3) statsautoriseraðum tannrøktara

*Stk. 2.* Í sambandi við ávísing frá lækna, verður ískoyti veitt til gjald fyri viðgerð hjá:

1) fysioterapeuti,
2) ergoterapeuti,
3) sálarfrøðingi,
4) statsautoriseraðum fótterapeuti

*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin í heilsumálum ásetur nærri reglur um ískoyti sbrt. stk. 1 og 2 og møguligar reglur um ískoyti til gjald av aðrari viðgerð.

*Ískoyti til brillur*

**§ 9.** Ískoyti verður veitt til gjald fyri brillur.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin í heilsumálum ásetur treytirnar fyri og støddina á ískoytinum sambært stk. 1.

*Ískoyti til hjálparráð*

**§ 10.** Ískoyti verður veitt til gjald fyri ávís hjálparráð, sum er liður í einari viðgerð, ella sum eru til persónar, sum ikki hava varandi tørv á hjálparráði.
Stk. 2. ískoyti verður veitt til gjald fyri hjálparráð at nýta í sambandi við heilivág.
Stk. 3. Landsstýrismaðurin ásetur støddina á ískoytinum og nærri reglur sambært stk. 1– 2.

*Millumtjóðasáttmálar*

**§ 11.** Landsstýrismanninum verður heimilað at gera sáttmálar við onnur lond um sínámillum viðgerð, barnsburðar- og gravarhjálp til persónar, sum fyribils eru staddir uttanlands.
*Stk. 2.* Samsvarandi teimum í stk. 1 gjørdu sáttmálum, kann landsstýrismaðurin áseta nærri reglur um:
1) at endurgjald kann verða veitt fyri viðgerð til aðrar heilsutrygdir í øðrum londum,
2) at gravarhjálp kann vera veitt í øðrum londum.

**Kapittul 3**

*Tilskotsnevndin*

**§ 12.** Landsstýrismaðurin í heilsumálum setur eina tilskotsnevnd, sum tekur avgerð sambært reglunum í §§ 13– 22.
*Stk. 2.* Tilskotsnevndin er mannað við trimum limum; einum løgfrøðingi, einum lækna og einum farmaceuti. Heilsutrygd veitir skrivara og rindar kostnaðin av tilskotsnevndini.
*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur um virksemi nevndarinnar.

*Heilivágur, sum er heimilaður tilskot*

**§ 13.** Tilskot verður veitt til heilivág, sum av tilskotsnevndini er lýstur at vera heimilaður tilskot. Landsapotekarin hevur dagføring av skránni við tilskotsheimilaðum heilivági um hendi.

*Vanligt tilskot*

**§ 14.** Tilskot verður veitt til keyp av heilivági, fyriskipaðum á forskrift.

*Treytað tilskot*

**§ 15.** Tilskot til fyriskipaðan heilivág kann vera treytað av, at heilivágurin er ætlaður persónum við ávísum sjúkum ella bólkum av fólki.
*Stk. 2.* Tilskot til tey heilivágssløg, sum í skránni eru tilætlað ávísar sjúkur, er treytað av, at sjúklingurin hevur eina av teimum sjúkum, sum nevndar eru í sambandi við heilivágssløgini. Tilskotið verður bert veitt, tá læknin á forskriftina hevur viðmerkt treytað tilskot: (T).
*Stk. 3.* Tilskot til tey heilivágssløg, sum í skránni eru treytað av, at tey verða latin persónum, ið fáa fólkapensjón ella fyritíðarpensjón, verður bert veitt, tá ið læknin á forskriftina hevur viðmerkt pensjónistur: (P), ella tá henda upplýsing er skrásett hjá apotekinum.

*Einstaklingatilskot*

**§ 16.** Í ávísum førum kann tilskotsnevndin eftir umsókn frá lækna gera av, at tilskot kann veitast einum ávísum sjúklingi til keyp av heilivági, sum ikki er lýstur at vera heimilaður tilskot sambært § 13.

*Tilskot til kostískoyti, merkivørur o.a.*

**§ 17.** Tilskot verður veitt til keyp av kostískoyti, merkivørum o.a., sum læknin hevur ávíst í sambandi við viðgerð av sjúku ella álvarsliga viknaðum persónum, og sum av tilskotsnevndini er lýst at vera tilskotsheimilað.

*Støddin á tilskotinum*

**§ 18.** Støddin á tilskotum er ásett eftir tilskotsprísunum sambært § 21 til heilivág v.m., sum veittur verður sambært §§ 13- 17, og sum viðkomandi persónur hevur keypt innan fyri eitt ár frá fyrsta keypi. Eitt nýtt tíðarskeið byrjar, tá viðkomandi persónur aftur keypir tilskotsheimilaðan heilivág, eftir at gamla tíðarskeiðið er farið.
*Stk. 2.* Eru útreiðslurnar innan fyri eitt ár undir 500 kr., verður einki tilskot veitt.
*Stk. 3.* Eru útreiðslurnar innan fyri eitt ár yvir 500 kr., er tilskotið:
1) 50% av tí partinum av útreiðslunum, sum er yvir 500 kr. og upp til 1.000 kr.,
2) 75% av tí partinum av útreiðslunum, sum er yvir 1.000 kr. og upp til 2.000 kr.,
3) 85% av tí partinum av útreiðslunum, sum er yvir 2.000 kr. og upp til 6.000 kr.
4) 100% av tí partinum av útreiðslunum, sum fer upp um 6.000 kr.
5) Tó 100% av tí partinum av útreiðslunum, sum fer upp um 3.300 kr. fyri børn, sum ikki eru fylt 18 ár, og persónar, sum eru fyltir 67 ár.

*Stk. 4.* Um ein persónur fyllir 18 ella 67 ár í tíðarskeiðinum, verður tilskotið roknað eftir stk. 2 og 3 fram til tíðarskeiðið endar.
*Stk. 5.* 1. januar á hvørjum ári verða upphæddirnar í stk. 2 og 3 prístalsviðgjørdar í kunngerð.

*Terminaltilskot*

**§ 19.** Terminalsjúklingar fáa neyðuga heilivágin v.m. útflýggjaðan ókeypis frá tí degi, læknin skrivliga hevur váttað, at sjúklingurin væntast at liva í stutta tíð afturat, og at lekjandi viðgerð verður mett at vera nyttuleys.

*Stk. 2.* Váttanin frá læknanum skal sendast Landsapotekaranum og skal innihalda hesar upplýsingar:

1) Navn, bústaður og p-tal hjá sjúklinginum.
2) Navn og starvsstaður læknans.
3) Váttan frá læknanum um, at sjúklingurin væntast at liva í stutta tíð afturat, og at lekjandi viðgerð verður mett at vera nyttuleys.
4) Dagfesting fyri útskriving frá sjúkrahúsi til terminalrøkt.
5) Undirskrift læknans.

*Útjavnan*

**§ 20.** Um ov stórt tilskot er veitt í sambandi við keyp av heilivági sambært reglunum í § 18, stk. 2 og 3, skal upphæddin útjavnast við komandi keypi av tilskotsheimilaðum heilivági. Útjavningin kann tó í heilt serligum førum verða útsett til næstu ferð, viðkomandi keypir tilskotsheimilaðan heilivág.

*Stk. 2.* Um ov lágt tilskot er veitt í sambandi við keyp av tilskotsheimilaðum heilivági sambært reglunum í § 18, stk. 2 og 3, skal upphæddin útjavnast við komandi keypi av tilskotsheimilaðum heilivági.

*Stk. 3.* Doyr sjúklingurin, fellur kravið sambært stk. 1 um útjavnan burtur. Krøv í sambandi við ov lítið veitt tilskot skulu setast fram í seinasta lagi eitt ár eftir, at sjúklingurin er deyður.

*Skipan av heilivági*

**§ 21.** Landsapotekarin skipar heilivág, sum er ætlaður somu indikasjón og sum hevur líknandi viðgerðarárin, í tilskotsbólkar.

*Stk. 2.* Fyri heilivág, sum verður skipaður í tilskotsbólk samsvarandi stk. 1, verður tilskotið ásett í mun til lægsta søluprís í bólkinum. Tilskotsnevndin kann tó gera av, at ásettur tilskotsprísur skal standa við í ásetta tíðarbili, hóast bíligari heilivágur verður tøkur í ásetta tíðarbili.

*Stk. 3.* Um sjúklingur bert fær part av heilivági úr einum pakka (skamtluting), verður tilskotsprísurin ásettur fyri hvørja heilivágseind (eindartilskotsprísur) við støði í tilskotsprísinum eftir stk. 1.

*Hækkað tilskot*

**§ 22.** Tilskotsnevndin kann, hóast ásetingarnar í § 21, í heilt serligum førum taka avgerð um at veita einum ávísum persóni hækkað tilskot samsvarandi § 18. Tilskotsnevndin tekur avgerð hesum viðvíkjandi seinast 14 dagar eftir móttøku av umsókn frá kommunulækna.

## Kapittul 4

*Fígging*

**§ 23.** Útreiðslurnar í sambandi við hesa lóg verða, har annað ikki er tilskilað, goldnar av landskassanum.

*Gjald fyri 2010 og 2011*

**§ 24.** Mánaðarliga gjaldið fyri hvønn einstakan persón, 18 ár og eldri, ið er fevndur av lógini, er 245 kr.

*Stk. 2.* TAKS krevur gjaldið inn fyri Heilsutrygd. Heilsutrygd rindar kostnaðin av hesum.

*Stk. 3.* Rindar ein persónur, ið er umfataður av lógini, ikki gjaldið innan ásettu freist, verður rentutilskriving framd. Rentutilskrivingin er 0,7% fyri hvønn byrjaðan mánað. Sama er galdandi fyri skuldskrivaða rentu. Lønareftirhald og panting kann eisini fara fram sambært reglunum í skattalógini.

*Stk. 4.* Persónar, búsitandi á stovni og sum harvið fáa niðursetta almannapensjón, eru undantiknir gjaldinum í stk. 1.

*Umsiting av lógini*

**§ 25.** Landsstýrismaðurin kann skipa ein stovn, Heilsutrygd, ið skal taka sær av at umsita lógina.

*Upplýsingar*

**§ 26.** Heilsutrygd kann krevja inn allar upplýsingar, ið eru neyðugar fyri at umsita lógina, m.a. hagtøl frá sjúkrahúsum, kommunum, klinikkum, læknum, tannlæknum v.m.

*Samráðingarnevnd*

**§ 27.** Landsstýrismaðurin setur eina samráðinarnevnd við 5 limum, harav einum frá Heilsumálaráðnum, einum frá Heilsutrygd, einum frá Fíggjarmálaráðnum og einum løgfrøðingi. Umboðið frá Heilsumálaráðnum er formaður. Samráðingarnevndin er vald fyri 4 ár.

*Stk. 2.* Samráðingarnevndin ger sáttmálar við læknafeløg og onnur fakfeløg um gjald fyri veitingar sambært lógini. Sáttmálar fáa bert gildi, um landsstýrismaðurin í heilsumálum góðkennir teir.

*Stk. 3.* Møguligar útreiðslur í sambandi við virkið hjá samráðingarnevndini verða goldnar av landskassanum.

*Samstarvsnevnd*

**§ 28.** Landsstýrismaðurin í heilsumálum setur eina samstarvsnevnd, har Kommunulæknafelag Føroya velur tríggjar limir, landsstýrismaðurin tríggjar limir, har eitt umboð er úr Heilsumálaráðanum og eitt umboð frá Heilsutrygd. Umboðið frá Heilsumálaráðnum er formaður í nevndini.

*Stk. 2.* Samstarvsnevndin viðger spurningar í sambandi við tulking av sáttmálum.

*Stk. 3.* Samstarvsnevndin skipar seg sjálv við einum skrivara.

*Stk. 4.* Avgerðir hjá samstarvsnevndini eru bindandi fyri allar partar. Landsstýrismaðurin í heilsumálum ásetur nærri reglur um virkið hjá samstarvsnevndini.

*Stk. 5.* Avgerðir hjá samstarvsnevndini vera tiknar við vanligum meiriluta. Um meiriluti ikki finst um tulking av sáttmálum, skal spurningurin leggjast fyri ein gerðarrætt við limunum í samstarvsnevndini og einum uttanveltaðum formanni, valdur av nevndini.

*Stk. 6.* Landsstýrismaðurin í heilsumálum kann seta líknandi samstarvsnevndir at viðgera spurningar

viðvíkjandi sáttmálum millum Heilsutrygd og tannlæknar, fysioterapeutar o.o. Reglurnar í stk. 1 – 5 vera nýttar samsvarandi. Tó kann talið av limum, sum verða valdir av pørtunum, ásetast til 2.

*Kærurættur*

**§ 29.** Avgerðir, tiknar av Heilsutrygd ella av tilskotsnevndini sambært hesi lóg, kunnu kærast til Kærunevndina í almanna- og heilsumálum innan 4 vikur eftir, at kærarin hevur fingið boð um avgerðina.
*Stk. 2.* Kærunevndin í almanna- og heilsumálum kann síggja burtur frá kærufreistini, tá serlig viðurskifti gera seg galdandi.
*Stk. 3.* Avgerðir, tiknar av Kærunevndini í almanna- og heilsumálum, eru endaligar í fyrisitingarligum høpi.

## Kapittul 5

**§ 30.** Henda lóg kemur í gildi 1. januar 2010, sbr. tó stk. 2 og 4. Samstundis fer úr gildi Afsnit I í lovbekendtgørelse nr. 514 af 21. juli 1989 om den offentlige sygeforsikring, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 5 frá 25. januar 2001. Tó verður kunngerð nr. 10 frá 11. februar 2000 verandi í gildi.
*Stk. 2.* §§ 10 og 13 – 22 koma í gildi 1. apríl 2010. Samstundis fer úr gildi løgtingslóg nr. 115 frá 21. mai 1993 um útreiðslur sjúkrakassanna til heilivág og afturbering landskassans, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 28 frá 30. mars 2009. Frá 1. januar til 31. mars 2010 veitir Heilsutrygd stuðul til heilivág samsvarandi reglunum í løgtingslóg nr. 115 frá 21. mai 1993.
*Stk. 3.* Galdandi sáttmálar millum yrkisfeløg og sjúkrakassarnar verða yvirtiknir av Heilsutrygd og verða verandi í gildi, til teir verða uppsagdir, og nýggir sáttmálar eru gjørdir.
*Stk. 4.* § 2 kemur í gildi 1. januar 2011.
*Stk. 5.* § 24 fer úr gildi 31. desember 2011.
*Stk. 6.* Nevndin í hvørjum einstøkum góðkendum sjúkrakassa hevur ábyrgdina av, at øll fíggjarlig viðurskifti pr. 31. desember 2009 millum sjúkrakassan og landið, kommunulæknar, limir o.o. verða avgreidd sum skjótast. Útreiðslurnar av hesum verða goldnar av sjúkrakassanum.
*Stk. 7.* Uppskot til løgtingslóg um fæið í føroysku sjúkrakassunum verður lagt fyri Løgtingið seinni í hesi tingsetuni.

Tórshavn, 22 desember 2009

**Kaj Leo Johannesen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 72/2009

# Løgtingslóg um broyting í lóg um almenna forsorg

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

## § 1

Í lovbekendtgørelse nr. 100 fra 2. marts 1988 om offentlig forsorg, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 66 frá 25. mai 2009, verða hesar broytingar gjørdar:

1) 18, stk. 7 verður strikað.

2) § 18, stk. 8, sum verður stk. 7, verður orðað soleiðis: „Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um stuðul sambært stk. 1-6, íroknað reglur um egingjald“.§

3) Aftaná § 18 a verður sett:
„**§ 18 b.** Stuðul verður veittur til hjálparráð til persónar við virkistarni orsakað av likamligum ella sálarligum breki ella varandi sjúku, um hesi:
1) eru neyðug fyri at vera í arbeiði,
2) munandi bøta um varandi avleiðingar av sjúkuni/brekinum, ella
3) munandi lætta um gerandisdagin í heiminum.
*Stk.* 2. Til persónar, ið eru 18 ár og eldri, fevnir stuðul til hjálparráð eisini um meirútreiðslur til serkost og til serlig klædnapløgg.
*Stk. 3.* Persónar, 18 ár og eldri, kunnu fáa ískoyti til keyp av hoyritóli frá góðkendum privatum veitara. Ískoytið er í mesta lagi 6.000 kr. fyri hvørt hoyritólið.
*Stk. 4.* Vanligt innbúgv ella brúkslutir eru ikki at skilja sum hjálparráð sbrt. stk. 1, hóast hesi verða nýtt í eini serstøðu.
*Stk. 5.* Stuðul verður ikki veittur til innbúgv og útgerð til persónar á stovni ella sambýli. Tó verður stuðul latin til persónligt tillagað hjálparráð til persónar á stovni ella sambýli.
*Stk. 6.* Stuðul verður ikki veittur til hjálparráð, ið verður nýtt í virksemi hjá myndugleikum.
*Stk. 7.* Landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur um:
1) hvørji hjálparráð stuðul kann veitast til.
2) nær hjálparráð verður veitt sum útlán.
3) rakstur, viðlíkahald, umvæling og endurnýggjan av hjálparráðum.
4) stuðul til keyp av hoyritóli frá góðkendum privatum veitara.
5) egingjøld og minstu upphæddir fyri hjálparráð.
6) hjálparráð til persón á stovni, sambýli o.l. , sum stuðul kann veitast til.
7) markamót í mun til virksemi hjá øðrum myndugleika.
*Stk. 8.* Landsstýrismaðurin kann í kunngerð javna ískoytið, sbrt. stk. 3.

**§ 18 c.** Til persónar við likamligum ella sálarligum breki ella varandi sjúku, ið krevur heilivág, verður stuðul veittur til ávísan heilivág og til útgerð og hjálparráð at nýta í sambandi við heilivágin.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur um stuðul til heilivág, herundir hvørji sløg av heilivági, stuðul verður veittur til, og um egingjøld.“

4) § 18 b og § 18 c verða hereftir til § 18 d og § 18 e.

5) Í § 18 b, sum verður § 18 d, verður í stk. 4, nr. 8 „§ 18 b, stk. 1“ broytt til: „§ 18 d, stk. 1“.

6) Í § 33, stk. 4 verður „§ 18, § 18 a, § 18 b og § 18 c“ broytt til: „§ 18, § 18 a, § 18 b, § 18 c, § 18 d og § 18 e“.

## § 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. apríl 2010.

Tórshavn, 22 desember 2009

**Kaj Leo Johannesen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 74/2009

Nr. 180 22. desember 2009

**Løgtingslóg**
**um**
**umvæling av MF Ternuni og MF Rituni**

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger lømaður hesa løgtingslóg:

**§ 1.**

Landsstýrismanninum verður heimilað at gera avtalur um neyðuga umvæling av MF Ternuni og MF Rituni.

Umvælingarkostnaðurin fyri báðar ferjurnar kann í mesta lagi vera 9,4 mió. kr.

**§ 2.**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Tórshavn 22. desember 2009

**Kaj Leo Johannesen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 80/2009

## Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um skatt av rentutryggingum v.m.

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

### § 1

Í løgtingslóg nr. 51 frá 29. desember 1971 um skatt av rentutryggingum v.m., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 100 frá 20. desember 2002, verða gjørdar hesar broytingar:

**1)** § 6A verður orðað soleiðis:
„**§ 6A.** Tá ið persónur við fullari skattskyldu til Føroya fær kapitalupphædd útgoldna frá eftirlønarskipan í tryggingarfelag, eftirlønarkassa, peningastovni o.l. sambært afsnit 1 í „lov om beskatning af pensionsordninger m.v.“ við seinni broytingum (pensionsbeskatningsloven), eru reglurnar um avgjald í § 6, samanbornar við § 7, ikki galdandi.“

**2)** Í § 7 verður sum stk. 4 sett:
„*Stk. 4.* Um byrjað er at gjalda út av eftirlønarskipan, ber ikki til at gjalda inn aftur á somu eftirlønarskipan „Ásetingin er tó ikki galdandi fyri útgjald av avlamiseftirløn frá eftirlønarskipan.“

**3)** Aftaná § 13 verður sett:

*„Tíðaravmarkaðar ásetingar*

**§ 14.** Fyri lutaeftirlønarskipanir sbrt. § 1 D verður sett eitt samlað hámark fyri loyvdum inngjaldi við frádráttarrætti í skattskyldugu inntøkuni. Hámarkið verður kr. 100.000 fyri árið 2010. Ov nógv inngoldin upphædd, ið ikki kann geva frádrátt í skattskyldugu inntøkuni fyri 2010, verður goldin út aftur uttan avgjald. Henda áseting er eisini samsvarandi galdandi fyri § 1 A.

*Stk. 2.* Har frádráttur í skattskyldugu inntøkuni er hægri enn loyvda markið fyri inngjaldi á kapitaleftirlønartrygging / kapitaleftirlønaruppsparing sbrt. § 1 E, verður fyri árini 2006 og 2007 loyvt, at ov nógv frádrigna upphæddin beinleiðis verður sett inn á lutaeftirlønartrygging/ lutaeftirlønaruppsparing, verandi ella nýstovnað. Váttan frá pensjónsveitara, um at upphæddin er flutt til lutaeftirlønarskipan skal vera TAKS í hendi í seinasta lagi 1. oktober 2010.

*Stk. 3.* Pensjónseigarin sambært stk. 2 avger sjálvur, hvørja lutaeftirlønarskipan og hjá hvørjum pensjónsveitara í Føroyum pensjónspeningurin skal flytast inn á.
Arbeiðsgevaraskipan gongur framum eina privat stovnaða eftirlønarskipan.

*Stk. 4.* Um ásetingin í stk. 2, 2. pkt. ikki verður fylgd, verður ov nógv inngoldna upphæddin goldin út við avgjaldi upp á 55%.

*Stk. 5.* Fyri árið 2008, har frádráttur í skattskyldugu inntøkuni ikki er tikin við í skattauppgerðini, ber til at fáa peningin út aftur uttan at rinda avgjald. Sama er galdandi fyri árið 2009. Útgjaldið skal vera gjørt fyri 1. oktober 2010.

*Stk. 6.* Hámarkið fyri inngjaldi á kapitaleftirlønartrygging/ kapitaleftirlønaruppsparing verður fyri árið 2010 ásett til kr. 25.000.

*Stk. 7.* Persónar, sum gerast ella eru 70 ár ella eldri í inngjaldingarárinum, kunnu ikki rinda privat teknaða kapitaleftirlønarskipan við frádráttarrætti í skattskyldugu inntøkuni í 2010.“

### § 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2010.

Tórshavn, 22 desember 2009

**Kaj Leo Johannesen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 85/2009

FØROYAPRENT

**Hefti 35 • Nr. 163-181 • Útgivið tann 30. des. 2009**